# BØNARLØTAN

**DESEMBER** **2021** **36. árg.**

## *1. Mikudagur* *Áp. 24.1-27*



*Simon vegleiðir fleiri enn 200 trúboðarar í 25 londum í Evropa.*

## EUROPEAN CHRISTIAN MISSION (ECM)
## ONGLAND, Taunton
### Dorit og Simon Marshall

Orsakað av koronu eydnaðist ikki at vitja samkomur, meðan vit vóru í Føroyum í okt./nov. Simon skal til Bulgaria 3-6 des., har ECM-trúboðarar hittast fyri fyrstu ferð, síðani korona byrjaði. Endamálið er at biðja saman og skipa arbeiðið. Simon hevur ábyrgd av bíbliutímunum har og í 24 øðrum londum í Evropa.

## KRINGVARPIÐ

5. des. kl. 17   Útvarpsmøti úr Betesda, Klaksvík
12. des. kl. 16   Sjónvarpsmøti úr Lívdini, Hoyvík

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 21 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## DANMARK

### Susan og Øssur Berghamar



Vit halda á í verkinum, eru við til møtini, andaktirnar á Sjúklingahotellinum, vitja og hava persónligt samband við mong. Eldrasamkoma verður í Kristnastovu 1. des. kl. 12.30.
berghamar@kristnastova.dk

## DANMARK

### Glostrup Frikirke

***2. Hósdagur*** ***Rutt 4.1-22***



## PAPUA NÝGUINEA,

### Sorimi (fj.arb.)

### Carol og Poul Joensen

Eg komi heim til Onglands 3. des. Arbeiðið saman við umsetingarráðgevanum er liðugt, so nú eru 80% av Nýggja Testamenti liðug. Eg arbeiði víðari við 2. Kor. og 1 Jóh. br. saman við tveimum øðrum sorimimonnum.

## ZAREPTA

Biðið, at legur kunnu haldast í komandi ári í tryggum umstøðum.

## *3. Fríggjadagur* *Jóel 1.1-20*



**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**

Takk fyri forbøn, stuðul og samfelag. Vit eru í Føroyum 13. des. til 13. jan. Møtini sunnudag kl. 11 halda fram í des. og jan. Seinasta fríggjakvøldssamkoma fyri jól verður 10. des. Vit byrja aftur 21. jan.



**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 14, Andreas 12, Kristina 10**

Í heyst var ætlanin, at Niels Pauli skuldi hava bíbliutímar á nøkrum samkomulegum í Zarepta. Av koronustøðuni eru legurnar útsettar til seinni í vetur og til várs. Takk fyri forbøn og stuðul í tænastuni.

## *4. Leygardagur* *Jóel 2.1-27*



**FØROYAR**
**Rutt og John í Skemmuni**

Takk fyri forbøn. Í fyrra helmingi av des. gevi eg út bók um Andrew W. Sloan, har fyrri partur er um lív og tænastu hansara og seinni partur fyrilestrar, sum hann helt í Ebenezer í feb. 1960.

- **Vanja og Svein í Prestgarði,**
  **Jenny 14, Svend 13, Terji 9, Petra 7**
- **Annika og Poul Færø**
- **Maria og Jens Bech**

## *5. Sunnudagur* *Áp. 25.1-27*



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Restina av árinum fyrireika vit okkum til skránna fyrra hálvárið 2022. Eisini verða ymiskir fundir á netinum við NTM leiðarar.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Mánadagur* *Áp. 26.1-32*



**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 12**

Eitt lið fer úr Dakar at hava eitt bíbliuskeið fyri eini 20 trúgvandi í Guinea frá 6-10 des. Tveir menn úr okkara ættarbólki luttaka. Biðið, at skeiðið verður til signing. Vit verða í Føroyum 18. des. til 6. jan.

## *7. Týsdagur* *Jóel 3.1-26*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Nú verður gjørt klárt til jólakonsertir og øll tey serligu møtini í des. Biðið, at nógv koma at hoyra evangeliið í lovsongi, tónleiki og talum.

## *8. Mikudagur* *2. Krønb. 1.1-17*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

Logos Hope er komin til Afrika. Biðið, at Gud sendir fólk at tæna við Logos Hope, og at gleðiboðskapurin røkkur út til tey vitjandi og til Saheløkið. Noomi Jóhanna Eysturtún og Hanna Berghamar eru umborð. Í des. savnar OM pening inn til ymiskar verkætlanir.

**ÍSLAND, Akureyri**
**Kristín Gerðalíð**



Eg leiti eftir arbeiði í Reykjavík. Biðið, at Gud leiðir meg til arbeiðið, sum hann hevur fyri meg. Eg komi heim í jólafrí í umleið 3 vikur.

## *9. Hósdagur* *Sálmur 1 og 2*




**OM, SUÐURAFRIKA**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja Mortensen**

Kurt og eg giftast 10. des. her í Mamelodi. Vit fingu bæði koronu uml. 21. november. Ungdómslegan 3-5 des. bleiv avlýst, tí koronustøðan er hættislig. Vit halda kortini bæði á í tænastuni her, so leingi Harrin vil. Takk fyri forbøn, nú eitt nýtt tíðarskeið byrjar.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 10, Tabita 7, Debora 6, Natan 3**

## *10. Fríggjadagur* *Áp. 27.1-20*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 15, Lydia 4**

Vit fara gjøgnum Matteusevangeliið í talum sunnudag og í bíbliubólkunum. Biðið, at Andi Guds virkar gjøgnum Orðið, at menniskju vaksa í trúnni, og at onkur tekur ímóti Jesusi.

## *11. Leygardagur* *Áp. 27.21-44*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Vit hava møtir hvønn sunnudag í Rødovre og Fredericia og bíbliuskúla hvønn hósdag.

## *12. Sunnudagur* *2. Krønb. 2.1-18*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Upptøkur til Jesusfilmin á saafimáli eru gjørdar. Filmurin verður nú gjørdur klárur til útgávu. Biðið, at boðskapurin í filminum skal røkka mongum. Hetta er helst fyrsti filmurin á saafi. Eisini er 1. Mósebók nú klár til prentingar. Vit hava tað gott.

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 15, Rebekah 13, Lydia 11**

⋆ Í dag fyllir Noah Kristin Joensen 8 ár

## 13. Mánadagur 2. Krønb. 3.1-17



### GRØNLAND, Qaqortoq
### Marjun og Páll Poulsen

*Mangan stríðið var nógv, tá ein skuldi á ferð,* syngja vit í NSGF 1364. Vit eru takksom fyri hjálpina, vit fáa frá góðum fólkum á staðnum. Lassi hyggur til legurnar, Aqqu ansar eftir Juvel og Juveleraq og René eftir sethúsunum, meðan vit eru heima.



**– Anna og Óli Steinberg**

## 14. Týsdagur Áp. 28.1-15

### GRØNLAND, Nuuk,
### Naalakkap Jiisusip Oqaluffia (fyrrv. Ebenezer)
### Hans Sivertsen

Grønlendskar familjur ynskja, at nøkur møti eru á grønlendskum uttan tulking til danskt. Hesum stuðla vit. Biðið, at grønlendingar taka hesa ábyrgd á seg í góðum samstarvi við samkomuna!



### GRØNLAND, Qasigiannguit
### Solveig og Daniel Kinda

Vit eru enn í USA, men fara til Qasigiannguit millum jóla og nýggjárs. Biðið, at Daniel fær nýtt pass, áðrenn vit fara. Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og signað nýggjár.

## *15. Mikudagur* *Áp. 28.16-31*



**FØROYAR**
**Anna og Símun Pætur**
**á Torkilsheyggi**
Covid-19 ger tað torført at vitja samkomurnar. Vit eru nakrir, sum regluliga eru í Zarepta og gera ymiskar ábøtur. Húsið skal haldast í lógligum standi. Eg eri takksamur fyri dúgligar kvinnur og menn í hesum arbeiði. Í summar fluttu Anna og eg í nýggja íbúð á Toftum; tað eru vit glað fyri.
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 14**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
⋆ Í dag fyllir Louie Mortensen 8 ár

## *16. Hósdagur* *Sálmur 3 og 4*



**ÍRLAND**
**Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**
Vit síggja, at Gud virkar í samkomuni á undurfullan hátt, nú koronuavmarkingar eru tiknar av. Nýggj fólk koma so at siga hvønn sunnudag, og tey, sum komu regluliga, koma nú aftur til møtini. Ivor arbeiðir við leiðslu og umsiting í samkomuni. Guðrun hjálpir at ansa mammu Ivor og fer at søkja nýtt arbeiði í komandi ári.



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

## *17. Fríggjadagur* *2. Krønb. 4.1-22*



**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
Bókin *Dópurin* (1982, 48 síður), er nú endurprentað við fleiri litmyndum av dópi. Samkomur og onnur eru vælkomin at biðja um bókina á tlf. 212045. Vitjunartænastan liggur okkum á hjarta, somuleiðis telefonvitjanir. Vælkomin at ringja til Svenning tlf. 212045 og til Birgit tlf. 212046 ella at skriva: lofti@olivant.fo

**Atlantic Mission, Juvel II**
Vit umhugsa at gera evangeliska ferð til Hetlands í apríl-mai 2022 – eisini fyri at stimbra brøður og systrar í trúnni. Vónandi kunnu vit greiða nærri frá í Bønarløtuni í jan. 2022.
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen,**
**Josva 12, Ester 11, Samuel 7**

## *18. Leygardagur* *2. Krønb. 5.1-14*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 17, Trisha 9, Emma 5**
Vit takka tykkum mongu, sum við bøn tykkara standa so trúliga saman við okkum í verki Harrans her í Molise.

## *19. Sunnudagur* *1. Pæt. 1.1-25*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

OM hevur hevur verið virkið í Turkalandi í 60 ár. OM byrjaði eisini brævaskeiðið í 1960-unum. Hetta varð hátíðarhildið á ZOOM-fundum, har nøkur av teim fyrstu luttóku. Vit fingu bæði Covid-19 í okt., men hava tað gott nú.

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 11, Leah Ève 8, Abigail 3**

⋆ Í dag fyllir Leah Ève Mortensen 8 ár

## *20. Mánadagur* *1. Pæt. 2.1-25*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

Biðið fyri syni okkara Hans og familjuni, nú tey nýliga eru flutt til Miðasia. Tað er stór broyting at venja seg við umstøðurnar við fýra smádreingjum. Rachel og eg hjálpa trúboðarum í tænastuni.

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen, Zephaniah 1**

Daniel, sonur Rachel og Peter, og konan Krissy fyrireika seg nú at fara í tænastu við NTM í Indonesia í mars 2022.

## *21. Týsdagur* *2. Krønb. 6.1-21*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 13, Noah 12, Karis 8,**
**Judah 6, Ethan 4**

Tveir týskir heimaskúlalærarar hava fingið góðkenning frá PNG og eru komnir higar í øllum góðum.

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

Biðið fyri okkum, nú vit leggja ætlanir fyri 2022. Eg eri partur av evropatoyminum.

## *22. Mikudagur* *2. Krønb. 6.22-42*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 13**

Hóast koronu hava vit lagt meiri orku í STEVN, sum eftir ætlan byrjar aftur komandi ár á eini heimasíðu. Fleiri skeið skulu síðani gerast, har møguleiki verður at tekna seg. Biðið fyri heilsu okkara.

## *23. Hósdagur* *Sálmur 5*



**FILIPSOYGGJAR**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Biðið, at vit sleppa aftur til Filipsoyggjar komandi ár. Í mars/apríl verða trý ár síðani, vit vóru har síðst.

## *24. Jólaaftan* *Luk.ev. 2.1-21*



**TÝSKLAND**
**Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 10**

Wina hevur nýliga verið sjúk og hevur framvegis pínu í síðuni. Okkum tørvar vísdóm í arbeiðnum at stuðla og tæna trúboðarum úr Týsklandi. Biðið Harra skurðarins senda út arbeiðsmenn til skurð sín.



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 5, Jude 3, Evelyn 1**

## *25. Jóladagur* *Luk.ev. 2.22-38*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Umsetingarráðgevin var her síðst í nov. Nú geri eg klárt til at prenta. Eg hjálpi unga umsetaranum við kladduni til 2. Mósebók og geri tillagingar til Esters bók, sum hann hevur umsett.

## *26. Annar jóladagur* *Luk.ev. 2.39-52*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Vit vænta at verða liðug at endurskoða Ápostlasøguna áðrenn ársskiftið. Biðið fyri mixteckvinnuni Mirsa, sum arbeiðir saman við okkum, at hon kemur væl fyri seg eftir Covid-19. Hon er koppsett og hevur ikki verið so sjúk.



**MEKSIKO**
**Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 17, Victoria 15,**
**Emma Grace 13, Jónatan 12,**
**Markus 9, Evita 6, Joy 4**

## *27. Mánadagur* *1. Pætur 3.1-22*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 8, Micah 8**
Vit búgva rættiliga spjadd her í økinum, so vit eru takksom fyri fýra húsbólkar. Biðið, at vit kunnu hava fleiri, tí fólk sakna samfelag, men vit mangla leiðarar. Biðið, at tað ikki verður neyðugt hjá okkum at savnast á netinum aftur, nú koronustøðan versnar í Evropa.



**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og**
**Jóhannus Frants Poulsen**



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Fimm fólk úr Nayba koma nú til møtir. Tey ynskja at skilja evangeliið; tí verða nú serligir bíbliutímar fyri tey. Vit halda fram at fyrireika lærutilfar, meðan vit enn bíða eftir loyvi at fara aftur til Filipsoyggjar.



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 17, Rebekka 16,**
**Hanna 13**



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 12, Nana 10, Louie 8, Rio 2**

**Útgevari** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd** Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
**Uppseting** Palli Skorheim, tel. 290087

## *29. Mikudagur* *1. Pætur 5.1-14*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 16, Aron 9, Noah Kristian 8**

Tað hevur verið eitt torført ár her við koronu hjá okkum sum leiðsla í The Well International og í samkomuni. Eingin endi tykist vera á støðuni. Biðið, at Harrin gevur okkum mót og styrki.

## *30. Hósdagur* *Sálmur 148*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 4, Timon 2**

Vit høvdu góða tíð í Goroka saman við øðrum trúboðarum og eru komin aftur til Kovol. Vit njóta at koma í samband við fólkið, og málið byrjar at geva meining. Fleiri hava havt malaria fyri stuttum, og trot er á heilivági til viðgerðina. Biðið, at sjúkan hæsar av skjótt, og at fleiri fáa viðgerð.


**Myndasavn** pallis76@yahoo.dk
**Prent** Føroyaprent, tel. 314555
**Telduposturr** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða** www.kbs.fo


NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK

**455 síður** **290 Kr.**

Søguliga skaldsøgan hjá Lynn Austin greiðir frá hendingum á døgum Nehemiasar og Ezra, tá ísraelsfólk vóru í útlegd í Bábel. Ezra fer heimaftur saman við nøkrum jødum at hjálpa og eggja Nehemias at fara undir at endurreisa fólkið og múrar Jerúsalems til Guds æru. Austin lýsir trúgv, iva, líðing, lýdni og dirvi hjá menniskjum í royndartíðum. Søgan er framhald av bókini *Pagtens vogtere*.




Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið mán.-frí. kl. 14:00-17:30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos

## GOTT NÝGGJÁR!

***Hann gevur hinum troytta kraft og hinum máttleysa mikla styrki.***

***Esaias 40.29***